

# Flora – har jólini byrja

Gávu- og blómuhandilin Flora í Klaksvík er staðið, har jólini byrja.

Ein handil sum ger nógv burtur úr jólunum er gávu- og blómuhandilin Flora í Klaksvík.

Handilin við Klaksvíksvegin er pyntaður til jóla og er á tremur við jólaprýði og tí sum hoyrir jólunum til.

Jólini hjá Floru byrjaðu fyrsta sunnudag í advent, tá handilin skipaði fyri jólahugna við kaffi, gløgg og tónleikaframførslu.

Í sambandi við jólini er nógv nýggj vøra heimkomin. Har eru jólagávuhugskot í hópatali og gávulutir til fólk í øllum aldri. Handilin hevur fleiri lekkur merkir og er eitt av teimum Green Gate. Í Green Gate fart tú koppar, talerkar, viskistikkir,teppir pútir og nógv annað.

Fleiri nýta eisini høvi at senda jóladekoratiónir ella hyazintskálir sum jólaheilsanir til vinfólk og kenningar.

Í jólamánaðinum eru fýra fólk knýtt at handlinum, har tvær eru útbúnar blómubindarar. Vit gera brúðarbukettir, kransar, borðprýði, dekoratiónir og onnur kreativ prýði við blómum. Alt verður gjørt, sum kundin ynskir. Hjá okkum er bert hugflogið, sum setir mørkini, sigur Rúna Reyðberg, sum eigur og rekur gávu- og blómuhandilin Flora í Klaksvík.

# Hetta er mín jólasangur

## Elinborg Joensen: *Hin vænasta rósan er funnin*



**Í TALU**

***– Vit áttu heldur at leitað at eyðmjúkum støðum, tí tá fáa vit Jesus í talu, sigur Elinborg Joensen í Hoyvík***

– Mín yndis jólasálmur er nr. 130 í sálmabókini. Tað er Brorson, sum yrkti hann í 1732, sigur Elinborg Joensen, sum býr í Hoyvík.

Hann snýr seg um, at hin vænasta rósan er komin í heimin. Fyrr var myrkt og vónleyst, nú er ljóst og vónríkt.

Men Brorson heldur tó, at kunnleikin um hesa rósu er rokkin ov stutt. Enn eru fleiri, sum als ikki hava fingið tað við. Og so er sálmurin eisini rannsakandi: Hví halda vit okkum so háar, hví standa vit altíð so reystir - í stórleika festir (ø.5)? Heldur áttu vit at leitað at eyðmjúkum støðum, tí tá fáa vit Jesus í talu.

Ikki eru reglurnar mangar, men Brorson fær sagt so ómetaliga nógv í hesum sálmi. Vit mugu minnast til, hví vit halda jól. Eisini vit, sum hava so nógv at stákast við undan jólum. Spell, um tað bert var ein vakur innantómur pakki.

Í síðsta ørindi lítur hann inn at sær sjálvum og biður eina bøn um ongantíð at missa hesa rósu burtur:

*Lat verøld meg háða og aga,*
*lat tornarnar stinga og naga,*
*lat lakið tey yvir meg breiða,*
*eg rósuna altíð vil eiga.*

Gleðilig jól!

## *Hin vænasta rósan er funnin*

*Hin vænasta rósan er funnin,*
*á hvassastu tornum útrunnin.*
*Vár Jesus, tann rósan, hon gróði,*
*hvar fólk fast í syndini svóvu.*

*2. Frá heiður vár spiltist hin fríði*
*Guðs bílæt at bera til prýði,*
*lá verøld í villu og oyði,*
*í synd vit tá øll burtur doyðu.*

*3. Guð rósuna læt tá fram spíra*
*at reinska og bøta vár' dýra*
*í syndini sekaða gróður,*
*so aftur hann verða kann góður.*

*4. Øll verøld seg eigur at frøa*
*og lovsálmar mangar at kvøða;*
*men stutt er tann kunnleiki*
*nomin,*
*at rósan til jarðar er komin.*

*5. Tit harðvunnu tistlar og dáar,*
*hví halda tit tykkum so háar?*
*Hví standa tit altíð so reystir*
*í spillandi stórlæti festir?*

*6. O, leitið at eyðmjúkum støðum,*
*for Jesusi grátið á knøum!*
*Tá fáa tit Jesus í talu;*
*tí rósurnar vaksa í dali.*

*7. Mín Jesus, tú veri í vali*
*mær rósa og dýrgripur sæli!*
*Tær eitrandi lystir tú oyðir,*
*til kross tín meg blídliga leiðir.*

*8. Lat verøld meg háða og aga,*
*lat tornarnar stinga og naga,*
*lat lakið tey yvir meg breiða,*
*eg rósuna altíð vil eiga.*

*Brorson 1732/Ókendur týðari*